(10)

**Viðmerkingar til Mál nr: 19/00040-1, Málsviðgjørt: GMM/FJ**
**Viðmerkingar til løgtingsmál nr. xx/2018: Uppskot til løgtingslóg um virksemi á rúsdrekka- og rúsevnaviðgerðarstovunum**

Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar gleðist yvir ætlanina um at regulera virksemið á rúsdrekka- og rúsevnaviðgerðarstovnum við lóg, eins og vit gleðast yvir at man vil tryggja øllum persónum rætt til at fáa ókeypis viðgerð fyri rúsdrekka- og rúsevnamisnýtslu.

Vit hava tó hesar viðmerkingar til hesa lóg.

Kapittul 2, Góðkenning av viðgerðarstovnum
§ 2. Lógin gevur Heilsutrygd heimild til at gókenna viðgerðarstovnar.
Í viðmerkingunum sæst at:

*"Ymsar treytir verða settar fyri at fáa góðkenning, bæði til innihaldið av viðgerðini, samansetingina av starvsfólkahópi, heilsufakligar og sosialfakligar førleikar, hølisviðurskifti og annað. Til dømis er áseting um, at samanlagt skal starvsfólkabólkurin hava viðkomandi útbúgvingar og royndir við rúsdrekka- og rúsevnaviðgerð. Hetta til tess at tryggja, at tilboðið hevur neyðugu dygdina."*

Øll kriterier, sum innganga í metanini um ein stóvnur skal hava viðgerðarloyvi, eru reint fakligar metingar og tað eigur tí at framganga greitt av lógini at tað eru bert fólk við neyðugum fakførleika, sum skulu viðgerða umsókninar í Heilsutrygd.

Víðari stendur í viðmerkingunum at:

*"Tað er hugsandi, at Heilsutrygd, í sambandi við viðgerð av umsóknum, hevur tørv á fakligari hjálp frá t.d. lækna ella øðrum fakpersónum til at meta um, hvørt ein umsókn um góðkenning lýkur tey lógarásettu krøvini."*

At tað bert er "hugsandi" og ikki eitt krav er alt ov ótrygt fyri tann persónin sum skal viðgerðast á teymum góðkendu stovnunum.

Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar
Lucas Debesar gøta 14
Postboks 1285
FO – 110 Tórshavn
Tlf. -298 31 13 09 – info@sjukrarokt.fo – www.sjukrarokt.fo

Kapittul 3, Visitasjón og heilivágsviðgerð.
§ 4. Ásetingin um at persónur skal visiterast av vakthavandi serlækna kann verða trupul at liva upp til av tí at okkum manglar serlæknar. Við hesum í huga eigur at framganga hvat skal gerast um eingin serlækni er.

§ 5. Orðingin er misvísandi í hesi grein. Ein delegatión frá einum løggildum starvsfólki skal gerast sambært rætningslinjum frá Sundhedstyrelsen. Spurningurin er tí, um hetta hoyrir heima í sjálvari lógini. *https://www.retsinformation.dk/pdfprint.aspx?id=129064*

**Vegna Felagið Føroyskar Sjúkrarøktarfrøðingar**
**Óluva í Gong, forkvinna**